# Toppdystur í Klaksvík



TÝÐANDI TOPPDYSTUR

*Dysturin í Klaksvík sunnudagin millum Stjørnuna og Neistan hevur stóran týdning fyri oddastríðið í hjá kvinnunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Hjá kvinnunum skal Stjørnan reisa seg eftir steypa-finalutapið, tá Neistin vitjar sunnudagin, og hjá monnunum kann KÍF koma eitt fet nærri FM-finaluni

Hilmar Jan Hansen

Mest áhugaverdi dysturin í hondbóltskappingini um vikuskiftið er dysturin í Klaksvík sunnudagin millum Stjørnuna og Neistan í Sunset-kappingini. Stjørnan er tvey stig framman fyri Tjaldur og fýra framman fyri Neistan, sum tó hevur spælt ein dyst færri.

Megnar Stjørnan at reisa seg eftir finalutapið fyri Tjaldri fyri viku síðani, er liðið sera væl fyri í oddastríðnum, men megnar Neistin hinvegin at vinna henda dystin og útsetta dystin ímóti StÍF í Havn hóskvøldið, er væl hugsandi at tey trý bestu kvinnuliðini tá liggja lið um lið.

Tjaldur, sum vann steypafinaluna, spælir á útivølli ímóti VÍF, og VB, sum hevur spælt væl í síðstuni, tekur á heimavølli ímóti StÍF. Kyndil hevur frí um vikuskiftið.

Hjá monnunum eru sjey umfør eftir, og her kann KÍF taka enn eitt fet ímóti FM-finaluni, nú StÍF kemur á vitjan í Kollafirði í morgin, um kollfirðingar klára at reisa seg eftir sítt finalutap fyri oddaliðnum, Neistanum, ið skal til Klaksvíkar at spæla ímóti Team Klaksvík.

Kyndil, sum er á triðja plássi og trý stig aftan fyri KÍF, hevur frí um vikuskiftið, og VÍF, sum er nummar fýra og fimm stig aftan fyri KÍF, tekur á heimavølli ímóti H71, sum er eitt stig aftan fyri VÍF.

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 17 | 487 | 397 | 90 | 28 |
| 2 | Tjaldur | 17 | 482 | 403 | 79 | 26 |
| 3 | Neistin | 16 | 437 | 367 | 70 | 24 |
| 4 | VB | 17 | 424 | 418 | 6 | 18 |
| 5 | Kyndil | 18 | 417 | 434 | -17 | 14 |
| 6 | VÍF | 17 | 383 | 466 | -83 | 7 |
| 7 | StÍF | 16 | 306 | 451 | -145 | 1 |

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 17 | 602 | 460 | 142 | 33 |
| 2 | KÍF | 17 | 478 | 445 | 33 | 22 |
| 3 | Kyndil | 18 | 467 | 465 | 2 | 19 |
| 4 | VÍF | 17 | 471 | 436 | 35 | 17 |
| 5 | H71 | 17 | 461 | 456 | 5 | 16 |
| 6 | StÍF | 17 | 437 | 448 | -11 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 17 | 400 | 606 | -206 | 2 |




YVIR OG FARIÐ

*Gamla starvsnevndin í Fótbóltssambandinum. Fýra limir fóru úr nevndini fyri einum ári síðani, og á aðalfundinum næsta leygardag standa teir síðstu tríggir fyri tørni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Feløgini skifta út í FSF

**FÓTBÓLTUR** Hóast tvey feløg hava stillað tveir av gomlu starvsnevndarlimunum uppaftur, heldur stóri meirilutin av feløgunum fast við, at tríggir nýggir nevndarlimir verða valdir á aðalfundinum um eina viku

Hilmar Jan Hansen

Tað var longu leygardagin 31. oktober í 2009, at formenninir í fótbóltsfeløgunum av fyrstan tíð komu ásamt um, at øll starvsnevndin í FSF skuldi skiftast út í kjalarvørrinum av málinum um aðalskrivaran, Ísak Mikladal, ið fráfaringaravtala varð gjørd við – eftir boðum frá feløgunum.

Á aðalfundinum í 2010 fóru Høgni í Stórustovu, Rúni Heinesen, Magnus á Stongum og Sveinur Tróndarson úr starvsnevndini, og eftir semjuni standa Karl Vidtfeldt, Niclas Davidsen og Niklas á Líðarenda fyri tørni á komandi aðalfundi, sum verður næsta leygardag.

Hóast bæði B71 og B68 í vikuni eru gingin ímóti semjuni, tí tey hava stillað ávikavist Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen uppaftur, er eingin ivi um, at ein stórur meiriluti av fótbóltsfeløgunum heldur fast við tað, tey avtalaðu upprunaliga. Niklas á Líðarenda er hinvegin ikki uppstillaður.

Semjan frá 2009 var aftur á skránni, tá formenninir hittust til fundar fyrst í desember, og enn eina ferð tóku feløgini undir við, at haldast skuldi fast útskiftingina í starvsnevndini. Tí er heldur eingin ivi um, at Jógvan Páll Joensen, Trygvi Mortensen og Heðin D. Poulsen, sum eru stillaðir upp í tráð við semjuna, verða valdir.

– Semjan var upprunaliga ein neyðloysn, sum øll feløgini tá tóku undir við, og eg ivist onga løtu í, at hon heldur. Tað skylda vit eisini teimum, ið longu eru farnir úr starvsnevndini, sigur formaðurin í Víkingi, Páll Gregersen, sum av mongum verður sæddur sum eitt slag av talsmanni fyri fótbóltsfeløgini.

– Hetta snýr seg ikki um persónar, tí talan er um menn, ið hava brúkt nógva tíð og orku upp á fótbóltin og hava tænt fyri seg. Men skulu vit koma víðari, mugu vit liva við hesi neyðsemjuni, sum merkir, at øll tann gamla starvsnevndin verður skift út.

Formenninir í fótbóltsfeløgunum hava ein fund beint undan aðalfundinum næsta leygardag, og lítið er at ivast í, at tað verður enn eina ferð mint á semjuna, so feløgini nú gera arbeiðið liðugt – um teimum dámar tað ella ei...

# Eyðun og Andreas døma í Týsklandi

**HONDBÓLTUR** Boð eru ofta eftir føroysku altjóða hondbóltsdómarunum, sum í annaðkvøld døma sjeynda altjóða dystin hetta kappingarárið

Hilmar Jan Hansen

Í annaðkvøld klokkan 18, føroyska tíð, skulu Eyðun L. Samuelsen og Andreas F. Hansen, í eldin sum dómarar í eini av áttandaparts-finalunum í EHF Cup-kappingini hjá monnum.

Dysturin er millum týska TBV Lemgo og turkiska Besiktas JK, og verður spældur í Lipperlandhalle í Lemgo, miðskeiðis millum Hannover og Dortmund. TBV Lemgo vann EHF Cup-kappingina síðsta kappingarár, so hetta er ein dystur, har nógv stendur upp á spæl.

Altjóða uppgávurnar hjá Eyðuni og Andreasi hava annars verið nógvar í vetur, tí dysturin leygarkvøldið er teirra sjeyndi hetta kappingarárið. Umframt seks dystir í europeisku kappingunum fyri feløg, hava teir dømt ein landsdyst.



NÓGV EFTIRSPURDIR

*Altjóða hondbóltsdómararnir, Eyðun L. Samuelsen og Andreas F. Hansen, døma í annaðkvøld sjeynda altjóða dystin hetta kappingarárið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*